# Klaksvíkar Fimleikafelag

## Lógir

§1. Navn felagsins er Klaksvíkar Fimleikafelag og heimstaður tess er í Klaksvík. Endamál felgasins, er við fimleiki at styrkja likamið, venja og fremja ans fyri góðari likamsrøkt.

§2. Øll kunnu gerast limir, virkandi ella hvílandi.

§3. Nevndin ásetur limagjald fyri teir ymsu bólkarnar. Eisini avgerð nevndin hvussu limagjaldið verður kravt inn. Nevndin hevur heimild at broyta limagjaldið, tá hon heldur tørvur er á tí.

§4. Um limur kemur at skylda felagnum pening, skal nevndin samstundis við at minna á hesa lóg, biðja viðkomandi gjalda skuldina áðrenn tvær vikur frá áminningini. Um so er, at viðkomandi ikki vil gjalda skuldina, kann nevndin siga hann ikki longur at vera í felagnum.

§5. Limir skulu í felagsmálum gera eftir teimum reglum, sum nevndin ásetur. Ganga limir ímóti hesum reglum, skal nevndin nokta teimum atgongd til fimleikin í styttri ella longri tíð, ella kunna teir verða útkoyrdir úr felagnum.

§6. Til at skipa fyri lógum felagsins verður vald starvsnevnd.

2. petti. Í starvsnevndina skulu veljast 5 fólk. Er viðkomandi ikki á fundinum, kann hann ikki veljast, uttan at skrivlig váttan fyriliggur um, at tikið verður við vali.

Starvsnevndin skipar seg sjálv. Nevndin kann velja kassameistara uttan fyri nevndina.

3. petti. Nevndin verður vald á tann hátt, at fyrsta árið verða 5 fólk vald. Næsta árið fara 2 fólk út, við lutakastið, og 2 nýggj verða vald. Soleiðis fara aðruhvørja ferð 2 og 3 út, soleiðis at hvør limur er valdur fyri tvey ár. Í øllum førum er afturval loyvt.

4. petti. Starvsnevndin hevur ábyrgd av allari leiðslu felagsins.

5. petti. Starvsnevndin skal føra gerðabók og til minstu lutir føra bók yvir ognir felagsins, innkrevja allar inntøkur og hevur einsamøll heimild at gjalda allar neyðugar útreiðslur ella skuldbinda felagið.

§7. Aðalfundurin verður hildin í fyrru helvt av november mánaða og hevur hann hægsta avgerðarrætt í øllum málum felagsins.
Ársaðalfundurin skal vera fráboðaður í minsta lagi 8 dagar frammanundan,

annaðhvørt skrivliga ella við lýsing. Vanligt atkvøðutal er nóg mikið til at avgerða øll mál, uttan tey í §11 nevndu.
Lógirnar kunnu tó ikki broytast uttan so, at 2/3 av atkvøðunum eru fyri broytingini.

2. petti. Tá lógliga er boða til aðalfundr, er hann avgerðarførur. Undantikið eru tey mál, ið eru tilskilað í §11. Eingin limur hann geva atkvøðu uttan at vera til staðar við atkvøðugreiðsluna.
Atkvøðurætt hava allir limir, sum hava fylt 15 ár og verið limir allan tann mánaðin, ið gingin er frammanundan aðalfundinum.

§8. Á aðalfundinum greiðir formaðurin frá virkinum í farna ári, og grannskoðaður roknskapur verður lagdur fram til samtyktar.

Síðani koma tey mál, ið innkomin eru.

Seinast skulu veljast nýggjir limir, tiltakslimir og ymiskt.

Í nevnd kunnu bert veljast fólk, sum eru limir felagsins.

Roknskaparárið er frá 1/9 – 31/8.

§9. Eykaaðalfund kann boðast til tá nevndin heldur tað vera neyðugt ella tá í minsta lagi 16 av teimum limum, ið hava atkvøðurætt, krevja tað. Eitt slíkt krav skal vera grundað, og skal sendast nevndini skrivliga.

§10. Um so er, at felagið er limur í einum ítróttarsambandið eru limirnir skyldugir at geva seg undir ta lóg og tær ásetingar, sambandið samtykkir fyri limir sínar.

2. petti. Felagið kann ikki gerast limur av slíkum sambandi, uttan at aðalfundurin hevur játtað.

§11. Samtyktir um at avtaka felagið ella broyta navn tess, kunnu bert gerast á aðalfundi, ið verður samankallaður við hesum endamáli, og bert tá ¾ av atkvøðunum eru fyri tí, eins og ½ av atkvøðuføru limunum eru á fundi.

Um ikki nóg nógvir limir eru á fundi, verður boða til nýggjan aðalfund, ið so kann avgerða hetta mál við vanligum fleirtali, óansæð hvussu nógvir limir eru á fundi.

Á sama hátt skal avgerðast, hvussu skal verða atborið við sølu av ognum felagsins o.ø., ið vil gerast neyðugt við slíkari samtykt, tó er í hesum málum vanligt atkvøðufleirtal avgerðarført.

Við avtøku av felagnum og sølu av ognum tess, skal møguligt peningaavlop fara til annað ítróttarfelag á staðnum.

Samtykt á aðalfundi 15/11 2022

Nevndin